# Hetta vil eg vi›mæla øllum at royna

*Seinasta hálva ári› hevur Finn Mørk úr Havn veri› á ítróttaháskúla í Oure. Hann er ikki í iva um, at talan hevur veri› um eitt sera lærurikt uppihald, har tú umframt at læra eisini hevur ta› ótrúliga stuttligt*



Nakrir hundra› næmingar ganga á skúlanum, og øll búgva hesi saman í størri og smærri húsum, ella smáttum



Finn hevur valt seg inn á linjuna fyri bóltspøl, har hann hevur fótbólt sum høvu›sgrein. Hetta merkir, at einir 20 tímar um vikuna fara til venjingar á skúlanum

*Jákup Mørk*

Ta› er ikki meira enn ta› sæst á kortinum. Oure, ein lítil bygd á landsy›ningshorninum á Fjóni. Koyrir tú eftir høvu›svegnum, tekur ta› kanska einar tveir tríggjar minuttir, so er b‡urin aftur um at hvørva í bakspeglinum.

Hóast ikki serliga stórt í vavi, so er tó okkurt áhugavert í b‡num. Í sunnara endanum av b‡num eru nevnliga fleiri stórir bygningar, og eitt skelti bo›ar frá, at her liggur Ítróttaskúlin í Oure.

## Nógv venjing

Ein av næmingum í skúlaskei›num, sum nú er um at vera runni›, er havnardrongurin, Finn Mørk, sum seinasta hálva ári› hevur búleikast á skúlanum millum hópin av ø›rum næmingum.

Her heima kenna vit hann einamest frá fót- og hondbóltinum, har hann um summari› hevur spælt vi› fremstu li›unum hjá B36 og í fjør B68, me›an hann um veturin hevur roynt seg á fyrstudeildarli›num hjá Neistanum.

Í Oure er ta› tó fótbólturin, sum hevur fingi› hægstu ra›festing, og hægsta ra›festing her ni›ri er ikki so líti›. Finn grei›ir frá, at einir 20 venjingar-tímar eru hvørja viku, og tá hann harumframt eisini hevur melda› sum lim í einum fótbóltsfelagi, sum liggur skamt harfrá, fara venjingartímarnir at liggja upp ímóti teimum 25 um vikuna.

Hendan fyrrapartin, sum vit n‡ttu til vitjanina, hev›i Finn tó frí, men kortini var ikki torført at finna fram til hansara. Ta› var bara at halda beina lei› oman til fótbóltsvøllin á skúlanum, har hann saman vi› ø›rum næmingum var í fer vi› at avgrei›a eina innanhysis kapping í fótbólti.

## Hevur leingi veri› ætlanin

Finn grei›ir frá, at hann leingi hevur havt ætlanir um at fara á ítróttaháskúla. Hetta hevur jú veri› vanligt millum føroyskar ungdómar í fleiri ár, og ta›, sum hann hev›i hoyrt um hesar, var so at siga bara positivt.

Ta› er tó ikki bara at siga ta›, solei›is at fara á skúlan. Fyrst skal naka› væl av peningi skavast saman. Einar 30.000 kostar uppihaldi› á skúlanum, men hóast hetta kann tykjast nógv, so er Finn sannførdur um, at man veruliga fær naka› fyri hesar pengar.

## Læturíkt

Sjálvandi hevur ítottaligi parturin nógv at siga. Vælútbúnir venjarar/lærarar syrgja fyri, at ástø›iligi parturin av frálæruni er í lagi. Ta› er nevnliga solei›is,a at umframt ta› venjing, sum ein sjálvur fær, so gevur skúlaskei›i› eisini møguleika fyri at taka venjaraprógv í teirri grein, sum man hevur valt.

Umframt at fáa undirvísing frá teimum lærarum, sum eru kn‡ttir at skúlanum, verða fyrilestrar av ymsum slag eisini hildnir, og tá eru ta› aloftast fólk, sum spæla ein aktivan leiklut í toppinum av donskum ítrótti. Eitt nú grei›ir Finn frá, at venjarin hjá donsku jarnkvinnunum, Jan Pytlick hevur hildi› ein fyrilestur, me›an nakrir av bestu rógvarunum eisini hava greitt frá, hvussu teir fyrireika seg á besta hátt.

- Hesir fyrilestrar haldi eg havi veri› rættuliga áhugaverdir, tí her veitst tú, at talan er um fólk, sum veruliga hava royndir innan ítrótt á hægsta stø›i, og tí ver›a evnini, sum teir umrø›a, eisini meira ítøkjulig, heldur Finn

T.d. var ta› sera áhugavert at hoyra rógvararnir grei›a frá, hvat skuldi til, fyri at halda seg millum teir bestu í heiminum. Sálarligi parturin hevur í hesum sambandi sjálvsagt ótrúliga nógv at siga, tí hvørji mál eru eftir at røkka, tá tú longu ert blivin heimsins besti? Harumframt hava hesir sjálvandi eisini eitt lív vi› sí›una av ítróttini, og hóast nógvu venjingartímarnar, skal sjálvandi eisini vera rúmd fyri lívinum saman vi› familjuni.

## Ikki bara ítróttur

Ta› er tó ikki bara ítrótturin, sum stórur dentur ver›ur lagdur á, tá tú ert á skúlanum.

Tá so nógv fremmandafólk eru savna›, ver›ur sjálvandi eisini lagdur stórur dentur á sosialu samverúna, og hetta lærir ein sjálvandi eisini ótrúliga nógv av.

Tú skalt jú kunna liva saman vi› hesum fólkum í fleiri mána›ir, so onkursvegna skal alt rigga saman hesa tí›ina.

Fyri at samansjóa allar næmingarnar, hava veitslur av ymsum slag veri› hildnar, men kanska mest spennandi parturin hevur veri› fer›irnar, sum eisini ver›a fyriskipa›ar á skúlanum. Sjálvur hevur Finn veri› vi› skúlanum í Onglandi, har tey millum anna› hugdu eftir Premier League fótbólti, og einki er at siga til, at hetta er ein uppliving av teimum heilt stóru.

Hann heldur, at ta› alt í alt ver›ur gjørt rættuliga nógv fyri, at næmingarnir skulu kenna seg so væl á skúlanum, sum yvirhøvur tilber, og hetta tykist eisini at hava eydnast rættuliga væl.

Finn er heldur ikki í iva, tá vit at enda spyrja hann, um hetta er naka›, sum hann vil vi›mæla ø›rum ungdómum at royna.

- Ja, so heilt avgjørt. Uppihaldi› á skúlanum er ein ótrúliga stór uppliving, sum eg ikki vildi veri› fyri uttan, grei›ir hann frá.

– Tú lærir eina rúgvu í allar mátar, og einki er at ivast í, at hetta eisini fer at koma til gó›ar seinni í tilveruni. At ta› so samstundis er ótrúliga stuttligt og spennandi, ger ta› so avgjørt ikki verri.



Sum um nakrir og tjúgu venjingartímar um vikuna ikki vóru nóg miki›, so var hann eisini at finna á fótbóltsvøllinum hendan fyrrapartin, tá hann annars hev›i frí